ist pørtunum herfyri at hittast í London.

Landsstýrismaðurin helt fast um ein størri kvotupart, men Noreg og ES vildu ikki tilluta Føroyum tey umleið 15%, sum landsstýrismaðurin hevur lagt upp til skal vera okkara partur.

Samráðingarnar slitnaðu, og Føroyar fara nú at áseta sær eina eginkvotu av makreli fyri 2010, samstundis sum landsstýrismaðurin fer at áseta í kunngerð, hvussu stór henda kvota verður, og hvussu hon skal býtast millum skipabólkar.

Landsstýrismaðurin hevur sagt, at nótaskipini helst fáa umleið ein helming av meirkvotuni, meðan aðrir skipabólkar og útróðrarflotin fáa hin helmingin.

### Nótaskip órógvast

Einir seks ymiskir skipabólkar hava sagt seg taka fult undir við, at landsstýrismaðurin ásetir Føroyum eginkvotu av makreli í ár, og áhugin fyri hesum tilfeingi er so stórur, at einar 40 umsóknir nú liggja í fiskimálaráðnum um at sleppa at fiska makrel í føroyskum sjógvi í 2010.

Einasti skipabólkur, sum er órógvaður av støðuni, er Felagið Nótaskip sum heldur, at Føroyar í fyrsta lagi áttu at samráðst við hini strandalondini hetta árið aftrat, samstundis sum roynt verður at fáa til vega haldgott skjalatilfar um makrel í føroyskum sjógvi.

Um summarið, tá makrelur stendur í føroyskum sjógvi, er hann feitur og bleytur, tí hann er fullur av æti, og tí meta nótaskipini, at tað loysir seg líka væl at halda seg til avtaluna, sum eisini merkir, at føroysk skip kunnu fiska makrel í norskum- og ES-sjógvi um heystarnar, tá fiskurin er bestur, og mest kann fáast fyri hann.

Felagið Nótaskip er samt við landsstýrismanninum um, at Føroyar eiga ein størri lut í felagskvotuni av makreli, nú fiskurin í størri mun kemur um okkara leiðir, men tey stuðla ikki landsstýrismanninum í, at Føroyar longu í ár taka seg burtur úr strandalandasamstarvinum og áseta sína egnu kvotu.




*- Keyparar fylgja væl við, og nú Ísland og Føroyar kunnu væntast at koma út á marknaðin við stórum nøgdum av makreli í summar og til heystar, er hugsandi, at prísirnir fyri lidnu vøruna ikki verða so frægir, sum teir, ið vit fingu, sigur Jón Rasmussen, skipari*

### Royndir við Norðborg

Ein spurningur, sum hevur verið nógv frammi í seinastuni er, hvørt tað loysir seg at virka makrel til matna, sum er veiddur í føroyskum sjógvi um summarið.

Í fjør summar fingu trý skip 1500 tons tilsamans – ella 500 tons í part – til royndir eftir makrel í føroyskum sjógvi. Hetta varð tikið burtur av heildarkvotuni, sum Føroyar áttu í sínum parti sambært strandalandaavtaluni.

Norðborg, sum er framleiðsluskip, fór at partrola saman við Fagrabergi, og síðan gjørdi eisini Finnur Fríði sínar royndir.

Jón Rasmussen var skipari á Norðborg á hesum túri, sum byrjaði beint fyri hálvan juli mánaða í fjør og vardi til ólavsøku.

- Túrurin, sum vardi einar 12-14 dagar, vísti, at nóg mikið var at fáa av fiski til okkara framleiðslu. Vit byrjaðu norðuri móti markinum og fingu fisk beinanvegin. Veiðan var ein blandingur av makreli og sild, har umleið 2/3 av veiðini var makrelur og stívliga 1/3 sild. Makrelurin var rímiliga stórur her norðuri, umleið 440 gr. í miðal. Seinni á hesum sama túri vóru vit eisini syðri í føroyskum sjógvi. Tá var eingin hjáveiða av sild, men makrelurin var hinvegin væl smærri, umleið 350-370 gr. í miðal, sigur hann.

### 1300 tons tilsamans

Jón Rasmussen sigur, at teir á hesum túri fingu nóg mikið av fiski til ta framleiðsluorku, sum Norðborg hevur.

- Vit fingu eini 120 tons í lastina um samdøgnið eftir tóv í einar 4-5 tímar, og tað er góð veiða. Vit brúktu soleiðis ikki so langa tíð til at fáa ta veiði, vit skuldu hava til okkara framleiðslu.

Skiparin sigur, at túrurin tilsamans gav 1300 tons, harav 800 tons var skráskorin og heilfrystur makrelur og umleið 500 tons var sildafløk.

- Vit fingu einar 7-8 krónur fyri kilo fyri skráskornan makrel, sum er ein lutfalsliga nýggj vøra. Íslendingar, sum eisini veiddu nógvan makrel í íslendskum sjógvi í fjør, gjørdu tað sama sum vit – ella vit tað sama sum teir, kunnu vit siga.

Jón Rasmussen sigur, at til samanburðar kann nevnast, at Norðborg fyri rundan og óvirkaðan makrel, veiddur í norskum ella ES-sjógvi um heystarnar, kunnu fáa sama prís og meiri enn fyri skráskornan og pakkaðan makrel, veiddur í føroyskum sjógvi um summarið.

- Hetta merkir, at vit kundu fáa tað sama og meiri fyri rundan og óvirkaðan makrel – enn fyri virkaðan og pakkaðan makrel úr føroyskum sjógvi. Orsøkin er, at tá makrelurin stendur í føroyskum sjógvi um summarið, er hann fullur av æti – og er bleytur.

### Vænta lægri prís

Skiparin sigur, at teir á túrinum í fjør summar eisini koyrdu nakrar makrelar ígjøgnum maskinurnar fyri at vita, um fiskurin var egnaður til flak, men fiskurin var alt ov bleytur og leysur í kjøtinum til tess.

Jón Rasmussen sigur, at keyparar fylgja væl við, hvussu útlit eru, og nú Ísland og Føroyar kunnu væntast at koma út á marknaðin við stórum nøgdum av makreli í summar og til heystar, er hugsandi, at prísirnir fyri lidnu vøruna ikki verða so frægir, sum teir, ið vit fingu fyri fiskin í fjør summar.

- Eg vænti, at tey skip, sum fara at fiska makrel upp í tangar í summar, eisni fara at fáa ein trupulleika, og eg ivist í, um tað yvirhøvur fer at bera til at fáa fiskin í líkinda standi til lands, sigur Jón Rasmussen, sum vit fara at venda aftur til í blaðnum mánadagin.

vilmund@sosialurin.fo

## » vit kunnu fáa tað sama og meiri fyri rundan og óvirkaðan makrel úr norskum sjógvi sum fyri virkaðan makrel úr føroyskum sjógvi

JÓN RASMUSSEN

# Granskarar við í ES samstarv

Hósdagin varð granskingarsáttmálin millum Føroyar og Evropasamveldið undirritaður. Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri, undirritaði vegna Føroyar, og aðalstjórin í ES aðalráðnum fyri gransking, Silva Rodriguez, undirritaði vegna ES.

Síðan Lissabon sáttmálin kom í gildi, er tað Evropasamveldið, ið er sáttmálapartur. Føroyar eru tískil millum tey fyrstu 10 londini, sum gera sáttmála við Samveldið. Føroyar hava nú tríggjar sáttmálar við ES. Ein fiskiveiðisáttmála frá 1977, ein handilssáttmála frá 1996 og nú eisini ein granskingarsáttmála.

- Tað hevur tikið seks ár at fáa henda sáttmála upp á pláss, og eg fegnist um, at vit endiliga eru komin á mál. Sáttmálin er slóðbrótandi fyri Føroyar, og eg havi góðar vónir um, at vit á fleiri økjum kunnu fáa enn tættari samstarv við ES. Í kortunum liggur nú at avgreiða ECAA sáttmálan um flogferðslu og at víðka verandi samstarv til onnur øki sum tænastur og útbúgving, sigur Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri.

Uttanríkisráðharrin helt røðu áðrenn undirritanina har ið hann legði dent á, hvussu stóran týdning tað hevur at hava eitt tætt samstarv við ES, og at føroyskir granskarar nú kunnu samstarva við granskarar í ES á jøvnum føti. Hetta fer at geva bæði føroyska garnskingarumhvørvinum og granskingarumhvørvið í ES góðar møguleikar at framleiða viðkomandi gransking, sum kemur at fáa stóran samfelagssligan týdning.

Um 25 fólk vóru til undirritanina og móttøkuna aftaná á Sendistovu Føroya í Brússel. Úr ES kervinum vóru bæði umboð úr Ráðnum og ES Nevndini. Umframt landsstýriskvinnuna í mentamálaum, var eisini umboð úr Granskingarráðnum við til undirritanina.


## DANSK INSTITUT FOR KROPSORIENTERET PSYKOTERAPI

**– instituttet grundlagt 1988**

**Ønsker du at blive psykoterapeut og/eller supervisor, med mulighed for skabelse af nye jobfunktioner?**

**1 årig og 3 årig psykoterapeutuddannelse**
**Start:** april, juni eller september 2010
Årligt: 20 kursusdage. Pris: årligt kr. 29.000
**Indhold:** fordybelse, selvudvikling, faglig kompetence, karakteranalyse, omsorgssvigt, chok og traumer, supervision, coaching, konfliktløsning og lederskab

**1 årig supervisionsuddannelse**
**Start:** december 2010. 12 kursusdage. Pris: 19.000.
**Indhold:** faglig og personlig udvikling og kompetencer, teoretiske metoder og praktisk træning, med mulighed for at blive en faglig dygtig supervisor.
Uddannelsen er anerkendt især indenfor de sociale, sundhedsmæssige og pædagogiske fagområder.

**Introduktion i Tórshavn: 26. juni**
Brochure og oplysninger mail tlf. +45 43 62 28 79
**info@difkp.dk · www. difkp.dk**